## Niður at spæla

Sámal og Ronnie spæla nógv fyri tíðina og teir fara nú til Keypmannahavnar at vitja føroyingar har. Fríggjakvøldið og Leygarkvøldið fer vælroynda føroyska duoin Sámal Rávnsfjall og Ronnie Nielsen at syngja og spæla á Skarv í Keypmannahavn. Teir hava áður roynt seg á staðnum, har hýrurin var góður. Sámal syngur, blæsur í munnhørpu og spælir guitar, meðan Ronnie syngur og spælir guitar. Teir spæla egnan tónleik og ymiskt annað blandað.



## Vænta onga fólkapensjón

Nógvir danir vænta ikki, at tað almenna fer at rinda teimum fólkapensjón, tá tey eina ferð røkka tí aldrinum. Ein spurnarkanning vísir, at av teimum, sum nú eru millum 18 og 34 ár, eru tað bara fimm prosent, sum vænta at fáa fólkapensjón. Tey, sum eru komin eitt sindur longri upp í árini, vænta harafturímóti at fáa gagn av verandi skipan. 75 prosent av teimum, sum eru farin um tey 56, vænta sær fólkapensjón, tá tey koma í tann aldurin.

# Studentaskúlarnir mangla dynamikk

**Leiðslurnar á studentaskúlunum mangla í dag ræðisrúm at skapa dynamiskar útbúgvingar og spennandi arbeiðspláss, men rektararnir á studentaskúlunum øvunda ikki hinum miðnámsskúlunum teirra skúlastýri. Kravið er professionell stýri, ársnorm og veruligt sjálvræði. Hetta leggur álitið um nýggjar miðnámsdeplar eisini upp til**

MIÐNÁM

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*





*Rektarnir í studentaskúlunum standa eitt sindur einsamallir við leiðsluni í dag, samstundis sum teir eru bundnir at Mentamálaráðnum og fíggjarlógini. Endurskoðanin av miðnámsskúlaskipanini leggur upp til sjálvstýrandi skúladeplar við stýrum, stjórum og økisleiðslum. Hetta halda rektarnir vera eitt framstig, men tað fer at krevja professionalismu og veruligt sjálvræði, leggja teir herslu á*

Í dag eru studentaskúlarnir almennir stovnar, meðan teknisku skúlarnir og handilsskúlarnir eru sjálvsognarstovnar. Rektarnir á studentaskúlunum halda báðir, at depilsstýri kunnu skapa eina meira dynamiska leiðslu, men teir hava ongan hug bara at kopiera tey stýri, sum hinir skúlarnir hava.

- Tað skulu vera ítøkilig, professionel krøv til stýrislimirnar. Tí um stýrini ikki verða kompetent, verður tað eitt afturstig í mun til í dag, sigur Sámal í Skorini. Hann heldur, at krav skal setast til bæði teirra menniskjafatan og samfelagshugsan.

- Her hugsi eg ikki um politiskan lit, men limirnir í stýrinum mugu hava eina visión fyri, hvussu føroyska samfelagið skal klára seg í kapping við onnur lond, samstundis sum vit ikki missa einstaka menniskja burtur.

Mikkjal Helmsdal leggur eisini dent á, at fólkini í stýrunum mugu hava fingurin á pulsinum. Tey kunnu koma frá universitetum ella arbeiðsgevarum, men neyðugt er, at tey hava førleikarnir, sum gera stýrini til góðan kjakbróður og kelda til íblástur. Her heldur Sámal í Skorini, at tað kanska hevði verið eitt gott hugskot eisini at fingið fólk uttanlanda uppí

- Tað hevði verið gott við fólki, sum tora at provokera og bróta tað innetna, tí føroyska skúlaskipanin hevur tørv á fólki sum tora at siga tingini, sum tey eru og tora at ganga undan, sigur hann.

Endurskoðanin av miðnámsskúlaskipanini leggur upp til, at deplarnir skulu vera sjálvsognarstovnar við professionellum stýrum. Í dag hava trý fólk í Mentamálaráðnum ábyrgd av at taka sær av øllum miðnámsútbúgvingum. Við einari so avmarkaðari miðfyrisiting metir arbeiðsbólkurin handan álitið, at tað er skilabest at flyta umsitingarligu stýringina frá myndugleikanum út á teir tríggjar deplarnar, sum skulu koma í staðin fyri allar núverandi miðnámsskúlarnar.

### Størri ræðisrúm

Dagliga leiðslan í deplunum verður sett saman av depilsstjóranum og leiðslunum fyri hvørt økið. Námsfrøðiliga ábyrgdin skal liggja hjá økisleiðslunum, og depilsstjórin skal tryggja, at tær hava neyðugu karmarnar at virka undir.

Bæði Mikkjal Helmsdal og Sámal í Skorini vænta, at samanspælið millum depilsleiðslu og økisleiðslur fer at skapa ein nýggjan dynamikk. Men hetta er treytað av, at leiðslurnar veruliga fáa møguleika at seta dagsskránna.

- Tað er neyðugt, at leiðslurnar fáa eitt ræðisrúm, sum ikki er ov avmarkað, sigur Mikkjal Helmsdal. Í Danmark eru miðnámsskúlarnir eisini gjørdir til sjálvsognarstovnar, men sjálvræði hevur víst seg at vera sera avmarkað, tí teir verða deteljustýrdir omanifrá.

Rektarin á Føroya Studentaskúla kundi hugsa sær, at depilsstjórarnir fingu møguleika at samráðast um í øllum førum ein part av lønini hjá lærarunum. Í dag arbeiða lærarnir eftir einum vikunormi, men Mikkjal Helmsdal staðfestir, at ein ársnormur er ein fyritreyt fyri, at depilsleiðslurnar fáa rúm at arbeiða bæði við strategiskari og námsfrøðiligari menning.

- Tað er frustrerandi sum leiðari at vera so bundin, at tú ongan møguleika hevur at seta tíð av til førleikamenning, ráðlegging og skeiðir, sigur hann.

Studentaskúlarnir eru í dag í størri mun enn hinir miðnámsskúlarnir merktir av siðbundnari undirvísing, og hetta heldur Mikkjal Helmsdal kann hava sínar røtur í vikunorminum, tí toymisarbeiðið og verkætlanararbeiðið krevur eitt annað arbeiðsstev.

- Komandi árini fer eitt heilt ættarlið av lærarum frá vegna aldur, og tí hevur tað alstóran týdning, at vit verða før fyri at draga tey góðu fólkini til okkara, sigur Mikkjal Helmsdal.

Endurskoðanin, sum var handað landsstýrismanninum í mentamálum hesa vikuna er ein strategisk gjøgnumgongd av, hvussu ein nýggj, dagførd skúlaskipan í Føroyum kann síggja út. Arbeiðsbólkurin var mannaður av rektarum og skúlastjórum, og teir hava ikki viðgjørt broytingarnar niður í smálutir. Hetta skulu arbeiðsbólkar seinni í holt við, og spennandi verður, hvussu hetta arbeiðið fer at ganga, tí sum Mikkjal Helmsdal sigur, the devil is in the detail.

# Stjórar skulu hava deadlines

**Depilsstjórarnir skulu setast fyri fimm ár í senn, og hetta heldur deildarstjórin á miðnámsdeildini á Mentamálaráðnum, Eyðbjørn Poulsen, vera eitt passandi tíðarskeið**

MIÐNÁM

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Eyðbjørn Poulsen hevur sjálvur sagt seg úr starvi fyri stuttum eftir góð fýra ár í Mentamálaráðnum. Hann sigur, at uppsøgnin ikki skal síggjast sum ónøgd við arbeiðslagið í ráðnum, tí sjálvt um arbeiðið hevur verið strævið, so hevur honum dámt væl.

- Tá eg fekk bjóðað starvið, segði eg, at eg setti fimm ár av til tað, og at tá fýra ár vóru farin, ætlaði eg at byrja at leita eftir onkrum nýggjum. Nú eru góð fýra ár farin, og eg havi fingið ein møguleika í privata arbeiðslívinum, sum eg ikki kann siga nei til. Tí fari eg nú, greiðir Eyðbjørn Poulsen frá.

Hann heldur tað hevur týdning, at stjórar seta sær evstamørk, soleiðis at teir fáa tað frá hondini, sum teir ætla. Tí heldur hann tað eisini vera eitt framstig, at stjórarnir á nýggju skúladeplunum, skulu verða áramálssettir.

Í løtuni eru rektarnir og skúlastjórarnir ikki áramálssettir. Sámal í Skorini hevur sitið 25 ár sum stjóri á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy, og spurdur um hann heldur, at hann hevði verið ein øðrvísi stjóri, um hann hevði sitið fyri fimm ár í senn, svarar hann, at tað heldur hann fyri so vítt ikki.

- Kanska hevði eg uppført meg meira taktiskt fyri at selja meg til næsta tíðarskeið. Men eg haldi, at tann góði stjórin altíð dugir at seta sær sjálvum tíðarfreistir og at fáa tingini at henda. Annars ber slett ikki til at vera í einum slíkum starvi, staðfestir hann.

Men hann hevur einki ímóti at skúlastjórar verða áramálsettir, tí hetta fer at geva stýrunum møguleika at sleppa av við ódugnalig fólk, og uttan iva eisini føra meira dynamikk inn í skipanina.



*Eyðbjørn Poulsen heldur tað vera eitt framstig, at stjórarnir á nýggju skúladeplunum, skulu verða áramálssettir*